# Kappingarreglur klassi 2

Viðv: Reim/band á hundi.

Hundaførarin kann hava hundin í bandi, tá farið verður fram til pelan. Um hundurin er leysur tá hundaførarin fer fram til pelan, og hundurin byrjar Outrun, áðrenn klárt er – Ikki komin fram til pelan, verður hundurin vrakaður.

**Outrun: uml. 120 metrar**

**Møgulig stig: 100 stig.**

Royndirnar skulu fremjast í niðanfyri nevndu røð.

1. **Outrun 20 stig.**
   Hundaførarin stendur við pelan. Hundurin skal vera við somu síðu av hundaførara, ið ein ætlar at senda hundin, og skal hava frítt útsýnið til seyðin. Hundurin má ikki liggja/standa frammanfyri ein.
   Outrun skal vera í ``Peruformi`` og skal enda í hóskandi frástøðu aftanfyri seyðin. Um hundaførari gevur boð til hundin, tá hesin er ávegis út eftir seyðinum, verður drigið frá í stigum, undantikið tá boð verða givin til hundin at steðga, tá hesin er í javnvágstøðu aftanfyri seyðin.

2. **Lift 10 stig.**
   Hundurin skal við róligari ferð, frá javnvág staðnum koma nærri og fáa stýr á seyðinum, so hesin samlaður og uttan strongd og við einari hóskandi ferð flytur seg móti hundaførarinum.

   Frí boðgevan.

3. **Fetch – Reka til 20 stig.**
   Seyðurin verður fluttur samlaður og við einari ferð uttan strongd, og í einari so beinari linju sum gjørligt til hundaføraran gjøgnum portrið.
   Tá seyðurin er komin fram móti hundaførarinum við pelan, skal seyðurin runda afturum pelan í passandi buga á røttu síðu. Um onkur seyður fer skeivu meðni pelan, kann alt fylgið rekast runt pelan einaferð enn, og tá vera stig tikin frá. Um hundaførari ikki roynur at fáa alt fylgið runt røttu meðna pelan, kann dómarin eisini taka stig frá. Ikki er neyðugt at vraka í hesari støðu.
   Dómarin metur um roynd verður gjørd at reka røttu meðna.
   Fetch er liðugt, tá seyðurin er komin rætt runt um pelan.

Frí boðgevan.

4. **Dreiv – Reka frá 30 stig.**
At reka frá byrjar tá seyðurin er farin framvið pelanum og hundaførarinum í einum hóskandi boga og tá skal seyðurin rekast til tað fyrra av tveimum portrum. Portrini kunnu vera gjørd av tveimum grindum við einum opið uppá uml. 6 metrar. Raksturin eigur at vera í beinari linju og við hógligari ferð.
Tá byrja er at reka frá, kann hundaførarin fara frá pelanum og fylgja aftaná hundinum til fyrsta portur og víðari til annað portur. Hetta er fyri at stuðla hundinum.
Tá seyðurin er komin gjøgnum næsta portur, kann hundaførarin sneiða av yvir til deilingarringin og koma í eina slíka støðu, at seyðurin tá skal rekast til hundaføraran seinasta strekið.
Tá ein velur at fara frá pelanum, skal dómarin trekkja stig frá, og er hetta eftir meting dómarans. Um hundurin rekur til hundaføraran á seinasta strekkinum, gevur hetta fleiri stig enn, um maðurin/kvinnan gongur aftaná.

Frí boðgevan

**5. Deila: 10 stig**
Deilingin skal vísast í deiliringi, sum er 35 metrar í tvørmát.
Fylgið skal deilast í 2 og hundurin skal týðiliga vísa, at hann kemur inn millum seyðin og heldur tí eina helminginum.
Áðrenn kappingin byrjar, gevur dómarin til kennar, um hann boðar frá, tá deilingin er gjørd.
Hundaførarin kann ikki halda áfram fyrr enn deilingin er gjørd.

Frí boðgevan

**6. Rættin: 10 stig**
Tá deilingin er liðugt, byrjar dømingin av at reka seyðin í rættina.
Rættin skal vera uml. 3 metrar long og uml. 2 metrar breið. Portrið skal við tann uttasta stólpan hava ein umleið 2 metrar langan togenda, sum hundaførarin skal halda fast í meðan ein rekur seyðin inní rættina. Portrið skal kunna latast minst 90 stig upp. Tað verður lagdur dentur á, at hundurin heldur seyðinum í javnvág við rættina ímóti portrinum. Portrið skal latast aftur, tá seyðurin er inni og er leysur av portrinum.
Hundaførarin kann hjálpa hundinum at reka seyðin í rættina uttan at missa stig. Tó er ikki loyvi at nema við seyðin, hvørki við stavi ella nøkrum likamsluti.
Um hundaførari heldur uppat uttan at vera liðugur, missir hann øll fingin stig.

Frí boðgevan.

Støðd á vølli: 200x350 metrar

Viðm:

Viðm: Hvat kann/kann ikki góðtakst í samband við kontakt millum seyð og hund.
Her verður hugsað mest um, hvat bit er.

Um seyður hóttir, kann hundur vísa sína styrkju við at verja seg. Dómarin metur um. Tekur hundur í reyvina/síðuna av seyði. So verður hann vrakaður og sendur av vøllinum.